gult10 cyan10 magenta10 svart10

Óli Holm verður landsstýrismaður

Avloysarin í sessinum sum landsstýrismaður í mentamálum verður helst aðalstjórnarformaður Tjóðveldisfloksins, Óli Holm

MENTAMÁLASESSUR
John Johannessen

Óli Holm, varaskúlastjóri í Vági og aðalstjórnarformaður Tjóðveldisfloksins, verður um vikuskiftið valdur at avloysa Tórbjørn Jacobsen í sessinum sum landsstýrismaður í mentamálum.

Hetta veit Sosialurin frá keldum innarliga í Tjóðveldisflokkinum.

Sum skilst verða tvey uppskot til nýggjan landsstýrismann. Ein partur av Tjóðveldisflokkinum ætlar sær at skjóta upp, at Signar á Brúnni, sum misti landsstýrissessin vegna illgruna um óreglusemi, men síðani varð reinsaður, skal fáa landsstýrissessin aftur.

Men tekur Signar sessin aftur, sleppur Tórbjørn Jacobsen, sum í gjár reyk út úr føroyskum politikki, í løgtingið sum varamaður fyri Signar á Brúnni. Og av tí, at tað er ógvuliga kalt í millum Signar á Brúnni og Tórbjørn Jacobsen, kann hugsast, at Signar á Brúnni sigur »nei takk« til at fáa landsstýrissessin aftur, fyri at sleppa undan, at Tórbjørn Jacobsen kemur á ting og verður ein hóttan móti honum í Eysturoyar valdømi til komandi løgtingsval.

Verið upp á tal fyrr

Hetta er tó ikki fyrstu ferð, at tað er upp á tal í Tjóðveldisflokkinum at velja Óla Holm til landsstýrismann. Longu tá samgongan varð skipað, vóru fólk í flokkinum, ið ynsktu, at Óli Holm skuldi gerast landsstýrismaður í undirvísingar- og mentamálum. Men ymisk viðurskifti gjørdu, at hetta varð av ongum.

Tá Signar á Brúnni fór úr landsstýrissessinum í mars í fjør, og Tjóðveldisflokkurin skuldi seta nýggjan landsstýrismann, var aftur upp á tal, at Óli Holm skuldi fáa landsstýrissessin. Men tingmaðurin, Hergeir Nielsen, sum eisini er úr Vági, skipaði saman við ørðum í flokkinum fyri, at Óli Holm heldur ikki hesaferð fekk sessin.

Sosialurin skilir frá keldum í Tjóðveldisflokkinum, at Hergeir Nielsen kendi Óla Holm sum eina hóttan móti sínum tingsessi til komandi val.

Hesa triðju ferð rokna fólk í Tjóðveldisflokkinum kortini við, at tað fer at eydnast at fáa Óla Holm í landsstýrissessin.

56 ára gamli varaskúlastjórin og aðalstjórnarformaðurin í Tjóðveldisflokkinum, Óli Holm, verður eftir øllum at døma nýggjur landsstýrismaður í mentamálum

Drúgvar royndir

Hóast Óli Holm ikki hevur verið serliga nógv frammi í politisku myndini í Føroyum, hevur hann kortini drúgvar royndir innan politiskt arbeiði. Í 1993 varð Óli Holm valdur til formann í flokkinum. Hendan sessin varðveitti hann til í fjør, tá skipanin varð broytt, og flokkurin fekk politiskan formann.

Óli Holm hevur kortini enn álitissess í Tjóðveldisflokkinum. Tá nýggi bygnaðurin bleiv samtyktur, vað Óli Holm valdur til formann í aðalstjórn floksins.

Óli Holm er føddur í apríl 1945, hann er útbúgvin lærari og hevur verið varaskúlastjóri í Vági síðani 1973. Óli Holm er kendur sum ein ógvuliga umhugsin og róligur maður, ið fremur síni avrik í tí stilla, uttan at varpa ljós á seg sjálvan. Flest fólk kenna helst Óla Holm frá arbeiði hansara í Fótbóltssambandi Føroya.

Sosialurin hevur roynt at fáa viðmerking frá Óla Holm um tíðindini um, at hann skal gerast landsstýrismaður, men hann hevur onga viðmerking.

Tórbjørn Jacobsen mans mót at taka avgerð

-Tað eru nøkur mørk í politiskum arbeiði, sum man má halda seg til. Ein landsstýrismaður er noyddur at taka hædd fyri sínum starvi og ikki bara virka út frá sínum egna temperamenti og sínum egna ego sigur løgmaður, sum tó viðgongur, at viðhvørt manglar tað í politisku skipanini í Føroyum at kunna taka eina avgerð. - Tórbjørn Jacobsen hevur so víst, at hann hevur mans mót at taka avgerðir

LANDSSTÝRISMAÐUR LEGGUR FRÁ SÆR
Jan Müller

-Eg havi ikki biðið Tórbjørn Jacobsen fara frá og eg havi heldur ikki heitt á formannin í Tjóðveldisflokkinum um at koyra mannin frá. Men tað er greitt, at eg havi tosað við formannin í Tjóðveldisflokkinum men bara ikki um hetta seinasta málið. Hetta sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður, nú enn ein landsstýrismaður í samgonguni leggur frá sær. Løgmaður hevur annars havt liggjandi eitt annað mál viðvíkjandi Tórbjørn Jacobsen á borðinum at taka støðu til. Tað er tað hann segði í tinginum herfyri og sum varð harðliga átalað.

Løgmaður viðgongur, at tað er óheppið at skifta út landsstýrisfólk ov oftani og tað skapar eisini ein turbulens í sjálvum stýrinum.

Men hvat hevur løgmaður so at siga um Tórbjørn Jacobsen sum politikara!

-Hann er ein litfagur persónur í politikki. Hann hevur verið øðrvísi enn tað vit vanliga hava upplivað á politiska pallinum. Hann hevur sín serstaka facon. Summi dáma henda væl og onnur dáma hann als ikki.

-Men er tað tá ikki uppfrískandi í politikki at hava ein slíkan mann sum Tórbjørn Jacobsen millum sín?

-Jú tað kann tað vera. Men tað eru nøkur mørk, sum man má halda seg til. Ein landsstýrismaður er noyddur at taka hædd fyri sínum starvi og ikki bara virka út frá sínum egna temperamenti og sínum egna ego. Tað hevur hann ikki dugað. Hann hevur sjálvandi ein lívshátt. Hann er skipari og er vanur at geva ordrar og er vanur við, at tað hann sigur, tað verður gjørt. Tá kann tað vera eitt rættiliga stórt umskifti at koma í politikk, har talan oftani er um eina langa og seiga process, og har avgerðirnar kanska ikki fella fyrr enn sera langt aftaná eftir, at øll møgulig fólk hava verið uppií. Tað er tí helst ein trupulleiki fyri gerandisdagin hjá einum slíkum persóni, sum ikki er vanur við hetta men við eina aðra process.

Løgmaður sigur annars, at Tórbjørn Jacobsen hevur eisini víst, at hann hevur torað at taka nakrar avgerðir, sum eru rættiliga ótraditionellar. Her sipar hann m.a. til at flyta Almanna- og heilsuskúlan til Suðuroyar uttan at taka nakran annan við uppá ráð.

-Tað tekur tú sum ein positivan eginleika?

-Tað velst sjálvandi um, tí tað at taka avgerðir er altíð knýtt at einum ávísum vága. Ein skjót avgerð kann verða røtt, men hon kann so sanniliga eisini vera skeiv, alt eftir hvussu tað hepnast. Men Tórbjørn Jacobsen hevur víst, at hann hevur mans mót til at taka eina avgerð.

-Tað er kanska nakað, sum manglar í føroyskum politikki?

-Tað veit eg ikki rættiliga. Processin er kanska í so lang oftani. Men eg skal tó viðganga, at viðhvørt manglar tað at kunna taka eina avgerð.

-Eisini hjá landsstýrismonnum?

-Hjá landsstýrismonnum kanska minni enn hjá tí politisku skipanini. Tí ein landsstýrismaður er væl eisini noyddur til at skeita eftir, hvat politiskt er møguligt. Tað kann vera ein avvegan. Men vit hava nøkur dømi um, at ein manglandi avgerð ger ikki tingini greiðari.

-Nú er hann so farin frá. Hann hevur verið partur av tínum teami. Hvussu hevur hann roynst sum landsstýrismaður?

-Vit hava eitt ótrúliga gott samarbeiði. Eg havi ikki nakað at útseta uppá okkara samarbeiði uttan tað, sum var frammi í fjølmiðlunum tá. Vit hava eisini havt eina aðra konfrontatión, sum var tá hann uttan nakað avtók grundlógardagin hjá lærarum. Tað er so aftur eitt dømi um, at man handlar bara uttan yvirhøvur at taka nakran við uppá ráð. Tann avgerðin var ikki ein gang løgfrøðiliga uppá pláss.

-Men tá ein persónur ger slíkt, tá stingur spurningurin seg upp, um hann er kompetentur at vera júst landsstýrismaður?

-Nú koma vit aftur inn á hetta at taka skjótar avgerðir. Eg trúgvi ikki, at nakar var involveraður í tí avgerðini um grundlógardagin. Hatta var bara ein fiks idé, og so ger hann tað. Tað er ikki tann rætti mátin at gera tingini uppá, tí tá fær tú nakrar trupulleikar, sum tú annars kanst vera fyriuttan. Og vit vita, at Tórbjørn er ein bráður maður.

gult11 cyan11 magenta11 svart11

Utbjóðing

Lastbilmekanikari til bilverkstaðið

Strandfaraskip Landsins søkja vio hesum eftir lastbilamekanikara til bilverkstaoio at byrja skjótast gjørligt.

Arbeiosuppgávurnar hjá bilverkstaonum
Høvuosuppgávan hjá bilverkstaonum er at umvæla, samskipa og menna tekniska violíkahaldio av lastbilum, bussum o.ø. koyriútbúnaoi hjá fyritøkuni.
Aorar høvuosuppgávur eru:
- Tryggja ein støougan rakstur av koyriútbúnaoinum
- Seta upp violíkahaldsmannagongdir og ætlanir
- Gera ætlanir um størri violíkahaldsarbeioi
- Hava dagligt eftirlit vio koyriútbúnaoinum, herundir samstarv vio Bileftirlitio, verkstøo og aorar myndugleikar

Strandfaraskip Landsins hava 15 lastbilar, 10 bussar, 7 vørubilar, 31 viofestisvognar og annan útbúnao.

Á bilverkstaonum eru íalt 8 fólk.

Starvio fevnir um
Vanligt violíkahaldsarbeioi uppá lastbilar, bussar o.a. útbúnao.

Førleikakrøv
- Lastbilamekanikari ella tilsvarandi mekaniska útbúgving
- Stóra koyrikortio er ein fyrimunur
- Arbeioa sjálvstøougt og hava lætt vio at samstarva
- Góoan røkjuskap

Setanartreytir
Setanartreytir veroa sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrio og Starvsmannafelagio, og er starvio lønt í lønarflokki 3.

Umsóknir
Áhugaoir mekanikarar skulu senda umsókn til:

Strandfaraskip Landsins
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn
og skulu vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 15 juni 2001.
Nærri upplýsingar um starvio kunnu fáast vio at venda sær til Heoin Mortensen, leioara á bilverkstaonum tlf. 34 30 00 lokal 146, ella e-post: hem@ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS

Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lofta landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan sostóðan mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stórkrøvum eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.

Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 100 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, harav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 12 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.

Lastbilmekanikari til bilverkstaðið

LANDSVERKFRØÐINGURIN

Leiðari til havnadeildina

Søkt verour eftir leioara til havnadeildina hjá stovninum.

Havnadeildin hevur ábyrgdina av málum viovíkjandi havnum og lendingum, fysiskari planlegging á sjónum, geofysiskum mátingum og øorum.

Arbeiosuppgávur
Havnadeildin tekur sær av málum viovíkjandi havnum og lendingum og teim játtanum, sum latnar veroa til hesi endamál, fysiskari planlegging á sjónum, hald av ferjulegum, io landio eigur á Gomlurætt og vio Oyrargjógv, og ferjulemmunum á teim kommunalu ferjulegunum o.a., hald av anodum, samstarv vio Farvandsvæsenet um avmerkingar, fysisk ráðlegging í sambandi vio aling á sjónum og veiting av tænastum til kommunur í sambandi vio at reka og halda havnir og lendingar.

Førleikakrøv
Sóknast verour eftir verkfrøoingi og helst vio royndum innan nøkur av omanfyri nevndu virkisøkjum.
Umsøkjarin skal harumframt hava góo samstarvsevnir. Eisini skal hann hava evni at ganga undan og kunna eggja og halda øorum til.
Umsøkjari vio leiosluroyndum hevur fyrimun, men er tao tó eingin treyt.

Setanarviourskifti
Løn og setanartreytir annars veroa sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrio og Føroya Verkfrøoingafelag.

Umsóknir
Umsóknir vio prógvum, møguligum ummælum og lívsgongdarlýsing (cv) veroa at senda til Landsverkfrøoingin, Postboks 78, 110 Tórshavn, og skulu veroa skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 12. juni 2001. Brævbjálvin eigur at merkjast "Leioari til havnadeildina". Allar umsóknir veroa viogjørdar í trúnaoi.

Nærri upplýsingar um starvio kunnu fáast frá Oyvindi Brimnes á tel. 31 13 33 (e-postur: oyvindur@lv.fo).

TILKOMIÐ FÓLK til Griffilin

Søkt verður eftir tilkomnum fólki at arbeiða hálva tíð

Vit sóknast eftir fyrikomandi, ágrýtnum fólki, sum dugir at arbeiða sjálvstøðugt.

Arbeiðstíðin er aðruhvørja viku fyrrapart, aðruhvørja viku seinnapart og annaðhvørt vikuskifti.

Tað er ein fyrimunur, um tú hevur royndir innan handil, men hetta er tó eingin treyt.

Tú kanst byrja eftir nærri avtalu, tó í seinasta lagi 1. august.

Ljóðar hetta sum nakað fyri teg, so ring og tosa við Kára Justinussen á tel 310840 ella 210840.

griffilin SMS

Á goymslu.
Bilar í sera góðum standi

1 BMW [illegible] TDS 1,7
árgang [illegible]
Koyrt [illegible] km.

1 Audi 80 [illegible]
1,9 Turbo Diesel
árgang [illegible]
Koyrt [illegible] km

1 Mercedes [illegible] Diesel
árgang [illegible]
Koyrt [illegible] km.

1 VW Transporter 2,4D
Vøruvognur [illegible]
árgang [illegible]
Koyrt [illegible] km.

1 Opel Vectra 1.7 TD
árgang [illegible]
Koyrt [illegible] km.

Ring og [illegible]

AUTO-VIRA

GEV BLÓÐ

KIA CARNIVAL
2.9 Dohc Turbo-Diesel 16 V, 126 HK, 5 hurðar

Rætti bilurin til mong endamál.
Pláss fyri 7 fólkum og hópin av viðføri.
D. B. Bilar
Tel. 310 600

Lesið Sosialurin -tað loysir seg